# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Kanningar okkara vístu greitt, at boðini um at myrða Kennedy komu út um gáttina hjá Johnson*
*/Howard Hunt)*







# – Eg myrdi tær ikki

**Steve Wright heldur uppá, at tað var ikki hann, sum myrdi fimm kvinnur í enska býnum Ipswich í fjør**

Gemma Adams, Tania Nicol, Anneli Alderton, Paula Clennell og Annette Nichols vórðu funnar myrdar uttan fyri enska býin Ipswich í desember í fjør. Líkið av teirri 25 ára gomlu Gammu Adams varð funnið tann 2. desember. Seks dagar seinni fann løgreglan líkið av 19 ára gomlu Tania Nicol, og teir næstu dagarnar fann løgreglan líkini av hinum trimum kvinnunum.

Nakrar dagar seinni tók løgreglan ein mann og skuldsetti hann fyri morðini. Tað vísti seg kortini, at hann var ósekur, og soleiðis var eisini við tí næsta manninum, sum bleiv settur í samband við morðini.

Beint fyri jól kom løgreglan fram á tann 48 ára gamla Steve Wright, og hóast hann segði seg vera ósekan, hevur hann sitið í varðhaldi síðani. Í gjár byrjaði rættarmálið ímóti honum. Løgreglan hevur ákært hann fyri at hava myrt tær fimm kvinnurnar í Ipswich, men í rættinum endurtók Steve Wright, at hann er ósekur.

– Tað var ikki eg, sum myrdi tær, segði hann, tá hann bleiv spurdur, um hann segði seg sekan ella ósekan.

# Johnson legði morðið til rættis

*Tann 27. januar doyði fyrrverandi CIA-maðurin Howard Hunt. Nú hevur sonur hansara almannakunngjørt eina bandupptøku, har pápin vil vera við, at Lyndon B. Johnson hevði samband við teir, sum myrdu John F. Kennedy, forseta. Johnson var varaforseti hjá Kennedy og tók við embætinum aftan á morðið. Sambært Hunt var Johnson púra frá sær sjálvum eftir at gerast forseti, og hann metti Kennedy sum eina forðing, sigur Hunt á bandinum.*



# Skulu tosa um veðrið



**ST hevur valt tríggjar fyrrverandi politikarar til serlig sendifólk í veðurlagsspurningum**

Tað er ST-aðalskrivarin, Ban Ki-moon, sum hevur valt teir tríggjar fyrrverandi politikararnar, og tað er ikki hvør sum helst, ið fær slíkan heiður.

*ST hevur aftur sent boð eftir Gro Harlem Brundtland*

Tey trý útvaldu eru fyrrverandi norski forsætisráðharrin Gro Harlem Brundtland, fyrrverandi forsetin í Kili Ricardo Lagos og fyrrverandi uttanríkisráðharrin í Suðurkorea Han Seungsoo.

Tey trý sendifólkini skulu arbeiða saman við stjórnum kring allan heimin, og høvuðsuppgáva teirra verður at hjálpa Ban Ki-moon í arbeiðinum at fáa ferð á samráðingarnar um, hvat gerast skal fyri at tálma veðurlagsbroytingunum.

## STUTT SAGT

### Orkukollvelting

Gamli forsetin í Kuba, Fidel Castro, hevur skrivað nakrar blaðgreinar í seinastuni, og í teirri fjórðu, sum kom í floksblaðið Gamma í gjár, eggjar hann til eina orkukollvelting. Sum vant er tað USA, sum fær skoluna frá gamla forsetanum. Castro skrivar, at USA vil hava onnur lond at hjálpa sær, so tað kann loysa seg úr tí politiska haftinum, sum oljuinnflutningurin úr Miðeystri er vorðin. Kubanski forsetin leggur afturat, at tað ber ikki til at metta tað amerikanska hjálandaveldið, sum einans hugsar um seg og síni. Hann mælir tí umheiminum til at gera eina orkukollvelting ímóti USA.

### Fer ikki á val

Formaðurin í franska høgraflokkinum Front National, Jean-Marie Le Pen, mælir sínum veljarum til at sita við hús sunnudagin, tá seinna umfar av franska forsetavalinum verður. Le Pen segði í gjár, at hann styðjar hvørki Nicolas Sarkozy ella Ségoléne Royal, og hann helt, at tað eiga hansara veljarar heldur ikki at gera. Á fyrra valumfari fekk Le Pen slakar 3,8 mió. atkvøður, men tað var alt ov lítið til at røkka seinna umfari. Politiskir eygleiðarar halda, at tann 78 ára gamli Le Pen fer at gevast í politikki nú, og at dótturin, Marine Le Pen, fer at taka við sum floksformaður.

### Kann enda við vali

Í Turkalandi vænta fleiri, at Tayyip Erdogan, forsætisráðharri, verður noyddur at skriva út nýval, eftir at grundlógardómstólurin hevur ógildað avgerðina hjá tjóðartinginum at velja Abdullah Gül, uttanríkisráðharra, til nýggjan forseta. Grundgevingin hjá dómstólinum er, at ov fáir tinglimir tóku lut í atkvøðugreiðsluni, og tað komst av, at andstøðan rýmdi av tingfundinum, áðrenn atkvøtt bleiv. Ætlandi skal tingið atkvøða eina ferð afturat, men eygleiðarar siga longu nú, at úrslitið verður tað sama sum fyrru ferð.